# Ferðasambandið er fyritreytin fyri trivnaði í Føroyum

**Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, segði á móttøkuni í hangarinum fríggjadagin, nú Atlantsflog hevur 20 ár á baki, at ferðasambandið og førleikin at ferðast er fyritreytin fyri trivnaði í framkomnu Føroyum**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Jens kristian Vang*




*- Vit vita, at tað er neyðugt at skapa alternativar vinnumøguleikar í Føroyum við áhugaverdum og avbjóðandi størvum til tess at gera tað áhugavert at búgva her, segði Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi*

- Eg minnist, sum tað var í gjár, tá eg fyrstu ferð trein inn um gáttina í hesum bygningi fyri skjótt 13 árum síðan. Eg gjørdist ovfarin av hesi vælskipaðu, dynamisku fyritøku, ið eg annars bert kendi sum ferðamaður. Ein stálsettur og kolosalur vilji merkti fyritøkuna tá – og ger tað enn í dag.

Á samkomuni fríggjadagin ásannaði Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, at tað er hesin sami vilji og áræði til at taka upp nýggjar avbjóðingar og flyta mørk, sum hevur flutt felagið fram á leið.

- Atlantsflog er í dag eitt felag, sum ræður yvir sjey flogførum, trimum tyrlum og 280 starvsfólkum við virksemi í fleiri londum.

## Merkisdagar

Stjórin nevndi nakrar dagar í søgu felagsins, sum hann heldur hava verið meira merkisverdir enn aðrir.

- Týdningarmiklasta markið í mínari tíð varð sett, tá roknskapurin fyri 1995 fyri fyrstu ferð vísti eitt avlop – og prógvaði, at eksperimentið bar til.

Síðan hevur avlop verið á roknskapinum øll árini.

- Vit eru errin um tey mál, vit hava rokkið higartil, 1) Ferðasamband til grannalond, 2) Títtari fráferðir, 3) Høgt reglusemi eftir umstøðunum og 4) Ment bygdaflúgving, leiting og bjargting.

## Stjórin takkaði

Magni Arge segði, at ferðasambandið og førleikin at ferðast er fyritreytin fyri trivnaði í framkomnu Føroyum.

- Vit vita, at tað eisini er neyðugt at skapa alternativar vinnumøguleikar í Føroyum við áhugaverdum og avbjóðandi størvum til tess at gera tað áhugavert at búgva her.

Stjórin nýtti eisini høvi at takka øllum sínum starvsfólkum hjartaliga fyri ágrýtni og dugnasemi.

Á móttøkuni segði eisini nevndarformaðurin í Atlantsflogi, Christian Andreassen, nøkur orð, og sama gjørdi Finnbogi Niclasen, flogvallaovasti, sum handaði Atlantsflogi ein málning í sambandi við dagin.

Í sambandi við heiðurin sum Ársins Læurupláss 2007, segði eisini William Smith, teknikani, nøkur orð, og tað gjørdi danin, sum handaði felagnum heiðursgávuna, eisini.

## Ársins læurupláss

Millum 30 onnur lærupláss innan flogídnaðin í Danmark, Føroyum, Íslandi og Grønlandi var Atlantsflog herfyri kosið ársins lærupláss 2007.

Tað er TEC (Teknisk Erhvervs Center) í Danmark, sum stendur fyri kjósingini, og í hangarinum fríggjadagin varð heiðursgávan handað Atlantsflogi.

Heiðurin er latin Atlantsflogi, tí sigur lærlingarnir: 1) trívast sosialt og hava góð arbeiðsviðurskifti, 2) verða virdir fyri sítt arbeiði og sum menniskju og 3) fáa avbjóðandi arbeiðsuppgávur og uppliva at læruplássið ger nakað serligt fyri lærlingin.



*Finnbogi Niclasen, flogvallaovasti, handar Atlantsflogi málning í sambandi við 20 ára dagin*



*Her fær Atlantsflog heiðurin fyri at vera Ársins Læurupláss í 2007. Felagið er valt út millum 30 feløg í Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum, sum arbeiða innan flogídnaðin*